


*Jákup Petur Bærentsen, leiðari av Eik íløguspælinum*



*Sverri Justinussen, leiðari í Eik Markets helt áhugaverdan fyrilestur um íløgur, har hann heitti á føroyingar um at brúka vit og skil, tá teir gera íløgur. Sosialurin fer í einum av komandi bløðunum at prenta fyrilesturin.*



*Vinnarin av íløguspælinum Ivan Joensen saman við konuni. Við lið teirra Jan Müller, stjóri á Sosialinum og Brynhild Setberg, samskipari á marknaðardeildini hjá Eik.*

# Sansir veitti íløguspæl til Kaupthing Bank

**Í september mánaði vendi Kaupthing Bank sær til Sansir við ynski um, at fyritøkan skjótast gjørligt kundu menna eitt íløguspæl á altjóða støði.**

**Sansir setti seg í samband við fyritøkuna BullBearings í London, og í tøttum samstarvi varð eitt n‡tt føroyskt íløguspæl ment til Kaupthing Bank upp á heilt stutta tíð.**

**Íløguspælið er tillagað føroysk viðurskifti. Umframt sergjørt snið hava Sansir saman við BullBearings gjørt ymiskar sergjørdar funktiónir. Spælið er á føroyskum og eitt serføroyskt alternativ til líknandi spøl á øðrum máli.**

**Tá tilmeldingarfreistin var farin, høvdu fleiri enn 4000 spælarar teknað seg. Endamálið hjá Kaupthing Bank við Íløguspælinum er at læra fólk um virðisbrøv og harvið eggja teimum at gera íløgur.**



*Tróndur Enni og annar ungur tónleikari settu sín dám á hátíðarhaldið við sínum frálíka spæli og sangi*

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

KUNNGERÐ

Í samband við at Løgtingvalið 19.01.2008 fer fram í Mentanarhúsinum, verður mint á, at ikki er loyvt at hanga valplakatir upp á Mentanarhúsið ella á økið rundanum húsið.

Fuglafjørður, tann 14.01.2008.

**Fuglafjarðar býráð**